## DAGSINS MEINING

# Lagnudagur

Dagur í dag er ein merkisdagur fyri skroypiliga fólkaræðið í Irak. Dagurin er eisini lagnudagur Iraks. Val er til lóggávutingið í nýskipaðu iraksku politisku skipanini. Hetta at fara frá sera harðrendum og bondskum einaræðið til fólkaræði eftir vesturlendskum leisti er eingin løtt tilgongd. Hetta er heldur eingin einføld tilgongd. Her er tvørturímóti talan um eina sera trupla og sera torføra tilgongd við nógvum forðingum og nógvum snávingarsteinum.

Tá USA og tess ameindu lupu á Irak fyri 1000 døgum síðani, var eitt endamálið at beina burtur einaræðið og seta fólkaræðið á stovn í staðin. Men eingin er í dag so góðtrúgvin, at hann ikki veit, at her vóru eisini onnur tilelvi. USA og Bretland vildu hava ræðið á oljuríkidømi Iraks, eins og tey høvdu tað áðrenn allar kollveltingarnar, ið sópaðu vesturlendsku ávirkanina út úr landinum. Eftir Kuwaitkríggið varð Irak jú boykottað og, merkti hetta, at oljutrot gjørdist, serstakliga í USA. Hóast boykottið var sum harragud veit og stórar mongdir av olju vórðu fluttar til vestheimsins umvegis tað sonevnda oil for food programmið, so elvdi hetta boykot til trot.

USA og Bretland vildu tí hava beinleiðis ræðið á oljuni í Irak, og var hetta eisini ein týðandi orsøk til álopið á stýrið hjá Saddam. Av tí at hesin frá at vera ein av bestu vinum USA av Kuwaitkrígnum varð vorðin aðalfíggindi USA við hópoyðingarváonum á gloymslu, var ikki torført at finna góðar grundir til at loypa á landið, og so var gjørt. At tað eftirfylgjandi er kom fram, at eingi hópoyðingarvápn vóru, og at Saddam hvørki var verri ella betri, enn hann hevði verið á teimum døgum, tá núverandi varforseti og verjumálaráðharri vóru húsfólk hjá Saddami, hevði ongan týdning. USA og Bretland høvdu fingið nakrar góðar grundir fyri at byrjað kríggið.

Tað er nú alt farið, og í dag snýr tað seg um fólkaræðið og skiftið frá aldargomlum patriarkalskum einaræði til fólkaræðið eftir amerikanskum leisti. Hóast hesin leistur kanska ikki situr so væl til tað, vit her í Europa meina við fólkaræði, so er alt betur enn tað ræðuliga einaræðið, ið valdaða meðan Saddam, var í vælmaktini. Øll demokratisk hugsandi menniskju mugu tí biðja gott fyri valinum í Irak í dag. Alt stendur og fellur við hesum vali. Friður og javnvág í Miðeystri. Tign og umdømi Bretlands og USA standa og falla við hesum vali. Ja, entá tað nú krígsførandi Danmark kann fáa trupulleikar. Lætt verður tað ikki, og dagurin byrjaði við eini yvirgangsatsókn. Nú er so bert at vóna, at valið kemur at gagna fólki og fólkaræði í Irak og at ein lívfør og virkisfús stjórn kemur burturúr valinum. Hetta merkir eisini ein stjórn, ið fær frið at virka uttan uppílegging frá USA og øðrum stórveldum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samansetingin av Búskaparráðnum

**Gordon Ejdesgaard**



Uppskotið hjá Bill Justinussen, løgtingsmanni, um eina broyting av samansetingini av Búskaparráðnum hevur fingið nakað av umrøðu í seinastuni. Onnur uppskot hava verið frammi. M.a. at skipa fyri eini ráðstevnu í staðin fyri vanligu frágreiðingar ráðsins. Hugskotið um ráðstevnuna ljóðar gott. Men tað ljóðar minni gott at avtaka Búskaparráðið.

Tað er ein grundleggjandi trupulleiki, sum stingur seg upp í uppskotinum hjá Bill Justinussen. Tað ljóðar skilagott, at fáa útlendskar búskaparfrøðingar sum part av Búskaparráðnum. Orsøkin skal helst vera at hesir ikki eru partur av nøkrum politiskum flokki ella annað ”kompromitterandi”. Hetta minnir tó ikki sørt um eina amerikanska rættarsak, har trupult er at finna gegnigar nevningar.

Uppskotið er soleiðis háttað, at tað kann vera trupult at vera ímóti tí.

Men um ein trýr, at tað at fara á altjóða marknaðin loysir sokallaða ”trupulleikan” við okkara lokalu búskaparfrøðingum, fer ein skeivur. Trupulleikin gerst ein annar og munandi størri. Nú skulu løgtingsmenn til at skilja millum búskaparfrøðingar sum hella til Keynes ella til dømis Milton Friedman. Frá teimum vinstrahallu til teir ultra liberalu. Óansæð valið verða teir settir í bás.

At velja búskaparráðgeving er í hesum føri ein búskaparpolitiskur spurningur. T.d. er einki at ivast í, at Torbjørn Jacobsen og Óli Breckmann er ósamdir, um teir skulu velja ein Friedmann-fjeppara sum ráðgeva. So longu her hava vit trupulleikan.

**Samanbering**

Ikki er heilt av leið at sammeta omanfyrinevna spurning við næmingin og lærarin. Næmingurin er ósamdur við lærarin og ynskir tískil ein annan lærara. Og kann næmingurin- Bill Justinussen- velja, ja so gera hann tað.

At broyta samansetingina er tað sama sum at koyra lærarin til hús, tí næmingurin er ósamdur við lærarin. Hvat við at givið næminginum nakað av serundirvísing? Hetta er ikki óvanligt innan skúlagátt. Hví ikki løgtingsgátt?

Hevur nakar innlit í føroyskan búskap, eru tað búskaparfrøðingarnir í Búskaparráðnum.

Tað er ikki búskaparfrøðingunum í ráðnum ella útlendingunum, nakað er galið við. Men Bill Justinussen! Geva ráðgevararnir ikki tey ráð Bill ynskir- ja, so út við teimum. Henrik Old segði tað soleiðis, at vit ótu tara í dag, um vit høvdu lurtað eftir búskaparfrøðingunum. So út við teimum! Hví ikki viðganga at fakið búskapur júst ikki er sterka síða løgtingsmanna. Og tað er heldur ikki meiningin, at so skal vera. Helst skal Løgtingið vera samansett av mongum yrkisbólkum.

Um ráðini frá útlendingum ikki passa í ”krammið” hjá onkrum flokki, so er tað tí fremmandu búskaparfrøðingarnir ikki skilja føroysk viðurskifti. Teimum verður óiva eisini skotið í skógvarnar at vera vinsta- ella høgravendir ella okkurt heilt annað.

Grønlendingar hava roynt nakað tað sama. Tá radikalur kritikkur frá fremmandu serfrøðingunum frá OECD og m.a. M. Paldam professara kom á borðið, bakkaðu grønlendingar. Útlendingarnir skiltu jú ikki tey ”serligu” grønlendsku viðurskiftini…. Hví skal støðan ikki vera tann sama her? Føroyskur og grønlendskur politikkur líkjast nógv í hesum sambandi: ” eingin skal siga okkum, hvat vit eiga at gera, um vit ikki vilja gera tað”. Hetta t.d. at seta spurning við sjálvsræðisrættin (integritetin) hjá løgtingsmanningini er ein heilag kúgv í politikki. Tak dømi um at broyta valskipanina. Tað er óhugsandi, at løgtingsmenn eftir ráðum frá útlendskum búskaparfrøðingum, høvdu broytt skipanina.

Uppskotið hjá Bill Justinussen kann tykjast skilagott. Men hædd er ikki tikin fyri at trupulleikin bert verður fluttur annað stað. Og trupulleikin gerst enn størri og munandi meira kompleksur.

# Svar til Kára P. Højgaard, løgtingsmann

**Bjørn Kalsø**
*landsstýrismaður*



Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, heitti um miðjan november alment á undirritaða um at virka fyri, at NMT 450 skipanin verður verandi virkin til GSM og VHF skipanirnar eru útbygdar.

Við hjálp frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í samskiftismálum, fór áheitanin víðari til Føroya Tele, ið alment hevur boðað frá, at NMT 450 skipanin ikki verður sløkt á nýggjárinum, men møguliga seinni í 2006. Somuleiðis upplýsti Føroya Tele, at arbeitt verður við at betra um GSM dekningin. Vónandi verður GSM dekningurin fullgóður, áðrenn NMT skipanin verður niðurløgd.

Viðvíkjandi VHF dekningi kann upplýsast, at eg í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2006 havi biðið um játtan, sum skal nýtast til at keypa nýggjan útbúnað til Tórshavn Radio. Nýggi útbúnaðurin kann tøkniliga handfara fleiri VHF sendi- og móttøkustøðir enn verandi útbúnaðurin, og fleiri VHF støðir eru neyðugar, um betrast skal um dekningin. Eftir ætlan verða fleiri VHF støðir settar upp í 2007.

Í áheitanini til mín bað Kári P. Højgaard eisini avvarðandi myndugleika fáa veðurstøðina í Mykinesi at virka aftur sum skjótast. Avvarðandi myndugleiki er Danmarks Meteorologiske Institut (DMI), men havi eg kannað, hví veðurstøðin ikki virkaði í nakrar vikur. Hetta skyldaðist, at DMI legði um frá NMT til GSM sendiskipan. Sendistøðin er virkin aftur, og veðurmátingarnar úr Mykinesi verða sendar bátum og skipum.

Meira útgreinað svar er sent Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, beinleiðis.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.